# Javnaðarflokkurin: Vend er komin í

**Landsstevnan hjá Javnaðarflokkinum, sum verið hevur um vikuskiftið, fegnast um, at Javnaðarflokk-urin eftir 8 ár í andstøðu aftur hevur tikið við landsins leiðslu, og at tað gekk skjótt at skipa eina breiða samgongu eftir valið og harvið fáa støðufesti og arbeiðsføri aftur í føroyskan politik**

LANDSTSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Í fíggjarliga trongum tíðum eigur at verða raðfest soleiðis, at almennu íløgurnar í størstan mun eru arbeiðsskapandi. Tá tað snýr seg um almennu rakstrarútreiðslurnar, eigur flokkurin at raðfesta soleiðis, at almannaøkið, heilsuøkið og útbúgvingarøkið ikki verða rakt av sparingum

Landsstevnan ásannar og fegnast um, at stórur og týðandi partur av valskránni hjá Javnaðarflokkinum er við í samgonguskjalinum. Samstundis heitir landsstevnan staðiliga á floksins valdu umboð um at virka fyri, at hesi mál verða framd í verki.

**Landsstevnan:**

*- fegnast um avtaluna, sum letur Føroya fólki avgerðarrættin á ríkisrættarliga økinum og um avtaluna um víðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir.*

*- heitir á flokkin um at fremja í verki ásetingarnar í samgonguskjalinum um, at fult gjøgnumskygni verður við fiskirættindum, og at tiltøk verða sett í verk at støðga spekulatión við fiskirættindum.*

*- heitir á flokkin um at leggja alla orku í at forða fyri, at arbeiðspláss í fiskivinnuni á landi hvørva orsakað av, at fiskurin fer beinleiðis á útlendska marknaðin.*

*- ásannar, at tað ongantíð hevur verið meiri neyðugt enn nú at stuðla uppundir vinnuspírar við at skapa góðar karmar fyri gransking, menning og nýskapan.*

*- fegnast um, at samhaldsfasti verður styrktur, og útgjaldið harvið økist. Næsta stig eigur at verða, at fyritíðarpensjónin verður dagførd.*

*- heitir staðiliga á flokkin um beinanvegin at bera so í bandi, at útlendsk arbeiðsfólk í Føroyum fáa virðiliga viðferð.*

*- harmast um, at alt ov fáar kvinnur eru í politisku skipanini. Tí tekur landsstevnan undir við, at flokkurin fer at taka ítøkilig stig til at fremja áhugan hjá kvinnum at taka lut í politiska arbeiðinum.*

*- fegnast um, at tað er eydnast samgonguni at seta umhvørvismál á dagsskrá og heitir á samgonguna framhaldandi at arbeiða fyri einum virknum umhvørvispolitikki.*

*- tekur undir við, at samgongan setir ítøkilig stig í verk fyri betri fólkaheilsu.*

*- tekur undir við, at landsstýrið fær til vega neyðugan kunnleika um ES viðurskifti, soleiðis at farast kann undir eitt veruligt orðaskifti.*

*- tekur undir við, at almennar fyritøkur verða einskildar, men bert um hetta er til gagns fyri alt samfelagið.*

*Næsta takið er kommunuvalið!!! ?*

# Skattalætti fyri økta pensjón

**Fyrsta formansrøðan hjá Jóannesi Eidesgaard sum løgmanni á landsstevnu Javnaðarfloksins í Læraraskúlahøllini í Havn leygardagin var týðiliga merkt av, at flokkurin nú situr við landsins leiðslu - og tí meira ítøkilig enn vanligt**

LANDSSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*
*Myndir: Jan Müller*

Eitt tað fyrsta politiska málið, Jóannes Eidesgaard, løgmaður tók upp í formansfrágreiðing síni á Landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum var skattalættin. Hann vísti á, at hetta málið varð tengt saman við eini bøttari pensjónsskipan við tað, at treytin fyri at Javnaðarflokkurin tók undir við skattalættanum upp á 60 milliónir í fýra stigum var, at samgongan gongur við til at inngjaldið í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnini eisini hækkar í stigum upp til 1,5% frá hvørjum parti

– Hetta fer at geva føroyskum pensjonistum eina munandi hækking, og vit hava harvið skapt fortreytir fyri einari eftirlønarnýskipan fyri øll, sum skal hvíla á tríggjar súlur: fólkapensjónina, samhaldsfasta og eina møguliga fakfelagspensjón, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann vísti eisini á, at skattalættin - hóast lýti - er ætlaður at koma serliga vanligum arbeiðaralønum og miðallønum, sum gjalda hægsta skatt av sínum inntøkum, til hjálpar, og at inntøkur upp á 170.000 kr í dag gjalda toppskatt.

Í sjálvstýrismálinum vísti Jóannes Eidesgaard á, at samgongan hevur »yvirtikið« málið soleiðis at skilja, at hetta ikki longur er eitt øsingarmál, at øll tilgongdin nú verður á føroyskum hondum og ikki longur eitt trætumál við danskar myndugleikar.

Viðvíkjandi ES-málinum nam løgmaður m. a. við tann veruleika, at partar av okkara hvøuðsvinnu - og aðrari vinnu við, eru farnir og fara á útlendskar hendur. Her setti hann spurningin, um vit ikki heldur eiga at lata høvuðsdyrnar upp og fáa ítøkiligar fyrimunir, heldur enn at lata alt far út gjøgnum bakdyrnar uttan at fáa nakað í staðin.

- Í hesum sera týdningarmikla spurningi muguv it taka politiska støðu, sum vit kunnu brúka í eini íkøkiligari langsiktaðari ætlan, segði Jòannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard nam eisini við granskingarøkið.

- Tá afturstig eru í búskapinum, er meira neyðugt enn nakrantíð at hugsa nýtt. Heldur enn at veita vinnuni beinleiðis rakstrarstuðul, eigur landsstýrið at stuðla upp undir vinnuspírar við at skapa góðar karmar fyri gransking, menning og nýskapan. Í hesum sambandi er landsstýrið farið undir at skipa og samskipa granskingina av nýggjum, so hon í størri mun verður við til at skapa nýggjar vinnumøguleikar innan eitt nú biotøkni og ílegugransking, segði hann.



_ *Skattalættin er ætlaður vanligum arbeiðaralønum og miðallønum, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

# Løgmaður vil einskilja almennar fyritøkur

**– Tað er ikki longur neyðugt at binda almennan kapital í fyritøkum sum Føroya Tele, Atlantsflog, Føoyra Banka og øðrum stovnum. Hesin peningur kann betur nýtast til afturgjalding av skuld ella til at gera nýggja íløgur, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum leygardagin**

LANDSSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*



*Katrin Dahl Jakobsen, floksskrivari, Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins og Bergur Dam, starvsnevndarlimur*

Hóast Javnaðarflokkurin ikki hevur verið heitasti talsmaður fyri einskiljingum, so setti formaður floksins spurningin, um tað nú kortini var rætt at stinga høvdið niður í sandin. Tað heldur hann ikki sjálvur - og tí røddi hann fyri varisligum einskiljingum av almennum fyritøkum.

– Søguligar grundir og kreppuloysnirnar fyrst í 90´árunum hava verið fyri at binda almennan kapital í til dømis Føroya Tele, Atlantsflog, Føroya Banka og aðrar stovnar. Tøkniligur framburður og altjóðagerð hava tó havt við sær, at hesin leiklutur hjá tí almenna ikki er eins neyðugur nú sum áður. Landið kann tí frígera kapitalin, sum er bundin, og nýta hann til onnur endamál. Til dømis at rinda aftur almenna skuld ella til at gera nýggjar íløgur, ið hóska seg betur til leiklutin hjá tí almenna. Samgongan er samd um, at har tað kann gerast við fyrimuni fyri tað almenna og fyri samfelagið sum heild, verða partabrøv í ávísum almennum fyritøkum boðin út til almenningin og/ella strategiskar íleggjarar, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann segði eisini, at fyri tað fyrsta er tað neyðugt, at Javnaðarflokkurin við sínari medvirkan kann syrgja fyri, at tá ein einskiljing verður framd, so verður hon framd rætt og skynsamt.

– Vit skulu tryggja okkum, at málið við einari einskiljing altíð skal vera, at vit vilja hava viðurskifti at virka betur fyri alt samfelagið. Eg eri eisini sannførdur um, at vit sum javnaðarfólk eiga at hava ein áhuga í, at vit kunnu leysgeva kapital úr niður-bundnum almennum ognum, sum m. a. kann fíggja eitt uppaftur betur samfelag. Tí skal einskiljing ikki vera eitt tabu-evni í javnaðarhøpi, og eg eri ivaleysur í, at skal nakað einskiljast her á landi, so verður tað ikki gjørt, uttan at vit leggja lag á - og tað er hóast alt betur enn at standa uttanfyri og síggja, at liberalistarnir gera tað við øðrum motivum, segði Jóannes Eidesgaard á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum í læraraskúlahøllini í morgun.

# Framgongd vend til afturgongd

**– Hóast búskapurin í síni heild er væl fyri, mugu vit ásanna, at tann stóri vøksturin, sum byrjaði miðskeiðis í 90'árunum, vendi til afturgongd í fjør. Hetta er ikki ein nýggjur veruleiki fyri okkum, tí búskapurin hevur altíð gingið í næstan regluligum vakstrar- og afturgongdsskeiðum, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum**



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Gerhard Lognberg, løgtingsmaður og Axel Skouboe*

LANDSSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Løgmaður vísti á, at vinnan er munandi betur fyri, enn hon var fyri góðum 10 árum síðani, tí hon er rættiliga studningsfrí og hevur ikki somu stóru kapitalútreiðslur.

- Fíggjarlógin komandi árini fer ivaleyst at liggja tungt í sjónum. Verandi fíggjarlóg hevur eitt hall upp á 200 mió. kr., og alt bendur á, at komandi fíggjarlóg fær eitt á leið eins stórt hall. Ein framskriving av verandi fíggjarlóg uttan sparingar og uttan nýggjar raðfestingar økir útreiðslurnar við góðum 130 mió. kr., so tað er eyðsæð, at skal pláss gevast fyri neyðugum raðfestingum, so má sparast á nógvum økjum umframt nýggj inntøkutiltøk, segði hann.

Sum vera man nam hann eisini við ríkisstuðlin. Hann vísti á, at tað vóru tey, sum søgdu, at ein skerjing av ríkisstuðulinum upp á 366 mió. kr. ikki fór at merkjast.

- Sjálvandi merktist tað ikki við tí næstan ónormala viðráki, sum okkara búskapur hevði, men nú vit hava meira normalar umstøður, nú síggja vit, at skerjingin fekk djúpar avleiðingar. Okkara lagna er so enn einaferð at tátta í. Útreiðslurnar eru vaksnar ótrúliga nógv seinastu mongu árini - á leið 1,1 mia. kr. - og tí kennist henda táttanin so fremmand fyri mong. Men at gera samanberingar við kreppuna fyrst í 90´árunum er púrasta burturvið, segði hann.

Jóannes Eidesgaard segði eisini, at landsstýrið hevur samtykt at fremja 10% í sparingum í lønum í miðfyristingini, og at vit ivaleyst fara at síggja nógvar stovnar, sum eisini mugu taka spariknívin í hond.

Hann segði eisini, at er samgongan samd um, at skúlaverkið, heisluverkið og vaktarskipanir ikki skulu skerjast í lønum, men tvørturímóti hava fulla lønarframskriving við 3,4%.

Samgongan er somuleiðis samd um, at alt skal gerast fyri at verja og varðveita vælferðarsamfelagið.

- Tó at útlitini ikki eru so góð fyri búskapinum, so vilja vit raðfesta nýggj tiltøk vælferðini at frama sera høgt. Men um hesi mál vil landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum røða um seinni.

# Helena fyri Jancy



*Helena Eliasen og Jancy Olsen*

**Helena Eliasen varð vald í landsnevndina hjá Javnaðarflokkinum fyri Jancy Olsen, sum ikki stillaði uppaftur**

LANDSSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*

Á landsstevnu Javnaðarfloksins í vikuskiftinum var nevndin vald aftur við teirri broyting, at Jancy Olsen, sum hevur sitið í starvsnevndini stillaði ikki uppaftur, og í hennara stað kom Helena Eliasen í nevndina sum næstformaður. Helena Eliasen hevur veri nevndarlimur í Eysturoyar Javnaðarfelag síðani 1993 og hevur eisini veri næstformaður í Eysturoyar Javnaðarfelag eitt skifti. Hin broytingin er at Katrin Dahl Jakobsen er valdur skrivari í Javnaðarflokkinum eftir Hans Paula Strøm.

Í nevndini sita nú.
Jóannes Eidesgaard, form
Bergur P. Dam, næstform.
Helena Eliasen, næstform.
Katrin Dahl Jakobsen, skrivari
Hans Pauli Strøm, nevndarlimur
Heðin Klein, nevndarlimur
Kristoffur Gaardlykke, nevndarlimur




Vika 40, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljan setti aftur nýtt met

MARKNAÐARRÁK

Júst sum væntað hækkaði amerikanski tjóðbankin (FED) leiðandi rentuna úr 1,50% í 1,75% í farnu viku. Hóast Alan Greenspan bar at kalla somu tíðindi eftir hendan fundin, sum 10. august, so ávirkaðust fíggjarmarknaðirnir lutfalsliga nógv av tíðindafundinum. Rentan hækkaði á styttru lánsbrøvunum og lækkaði á teimum longru. Eisini partabrøv hækkaðu av hendingini. Størsta hendingin í vikuni var kortini, at oljan aftur náddi metstiginum frá august.

Tíðindini frá fundinum vóru, at FED framvegis er bjartskygt um búskaparvøksturin í USA og tað var jaligt, at tey nú aftur eru meira bjartskygd um støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Hetta gjørdi, at styttru lánsbrævarenturnar hækkaðu, tí hetta økir um sannlíkindið, at FED, júst sum teir hava lovað, aftur fara at hækka leiðandi rentuna í næstum. Tey í FED eru samstundis minni dapurskygd um hækkandi prísvøkstur, tí lækkaðu longru lánsbrævarenturnar.

Orðini hjá FED um prísvøksturin og tað at oljan aftur náddi prísmetinum frá august í farnu viku, fekk stóra ávirkan á fíggjarmarknaðirnar. Íleggjarar hava í longri tíð vantað long lánsbrøv, tí ein rentuhækking hevur verið væntandi. Tíðindini hava tí noytt hópin av íleggjarum at keypa long lánsbrøv aftur. Úrslitið er, at 10-ára lánsbrævarentan er lækkað heili 0,2%-stig seinastu vikurnar og er nærkað metlága stiginum frá mars.

Hesa vikuna verða fleiri búskapartøl kunngjørd, ið kunnu ávirka marknaðirnar. Millum annað verður endaliga BTÚ talið í USA fyri 2. ársfj. kunngjørt. Talið verður væntandi dagført úr 2,8% í 3,0%. Meira áhugavert verður, tá PCE-prístalið verður kunngjørt hósdagin. FED hevur sett prísvøksturin í andglettin. Eitt neyvt eyga verður tí eftir prísvakstrartølum í næstum. Eisini tøl um oljugoymslurnar í USA kunnu fáa stóra ávirkan.

Ein spennandi vika er fyri framman. Eftir at nógv long lánsbrøv vóru keypt í farnu viku, skal nú minni til at fáa lánsbrævarenturnar at hækka. Búskapartølini avgera tó, hvussu marknaðirnir fara at hátta sær, men líkt er til at renturnar kunnu hækka eitt vet frá metlágu stigunum.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,57% | -0,02% |
| 5 ára lánsbræv | 3,47% | -0,05% |
| 10 ára lánsbræv | 4,31% | -0,04% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 277,1 | 0,8% |
| OMX, Svøríki | 695,4 | -0,7% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.682,3 | -0,9% |
| S&P 500, USA | 1.110,1 | -1,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,34 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 167,72 | 0,5% |
| Norrøn Partabrøv | 81,51 | -0,1% |
| Altjóða Vøkstur | 61,22 | -1,6% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 606,87 | -0,6% |
| EUR | 743,91 | 0,0% |
| GBP | 1.095,43 | 0,4% |
| NOK | 89,11 | 0,5% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*